FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

15. oktober 2021
Mál: 21/20369-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-049/2021

Svar til fyrispurning 52-049/2021 frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um makrelkvotur sum endurgjald fyri vantandi fiskiveiðiavtalu við ES

Spurningar:

1. Hvør er lógarheimildin og fyrisitingarliga heimildin fyri, at landsstýrismaðurin boðar frá í útvarpinum hjá Kringvarpi Føroya, at hann fer at lata 10.000 tons av makreli í endurgjaldi til ávísar skipabólkar, tí at ongin fiskiveiðiavtala er gjørd við ES í 2021?

2. Hvør er tann sakliga og vigaða grundgevingin fyri hesi fyrisitingarligu avgerð og fráboðan, og hvør ítøkilig meting og skjalfesting liggur til grund fyri at boða frá endurgjaldi uppá 10.000 tons?

3. Hvørji ítøkilig skip ella feløg er talan um, ið skulu fáa hesar kvotur, og hvussu er uppgerðin gjørd og skjalprógvað í hvørjum einstøkum føri um, hvat tey skulu hava mist, orsakað av vantandi fiskiveiðiavtalu við ES?

4. Hvørji fordømi finnast í fyrisitingarlóg og -siðvenju fyri hesi avgerð, og hvørji fordømi fer henda avgerð at skapa mótvegis øðrum borgarum í landinum?

5. Sambært líkareglu, proporsjónalitetsmeting og sakligari viðgerð, hvussu nógv ætlar landsstýrismaðurin skal verða latið í sonevndum endurgjaldi til skipabólkar og borgarar, sum kunnu staðfestast at hava mist, orsakað av vantandi avtalu við Stórabretland, Noreg, Ísland, ES, og tey, ið hava mist orsakað av vantandi avtalum í t.d. NAFO, Irmingerhavinum, NASCO v.m. – bæði fyrr, nú og frameftir?

Svar:

Til nr. 1.
Løgtingið hevur í lógini um sjófeingi givið landsstýrismanninum heimildir at býta tøkar fiskimøguleikar.

Eftir § 22, stk. 1 kann landsstýrismaðurin í føroyskum sjógvi áseta kvotuskipan, fiskidagaskipan ella aðra skipan og nærri reglur um atgongd, býti av tøkum fiskimøguleikum millum bólkar av fiskiførum, einstøk fiskifør og veiðihættir, og hvussu fiskiskapurin skal fara fram. Undantikin er fiskiskapur skipaður sambært § 18, t.e. fiskidagaskipanin.

§ 23 í sjófeingislógini fevnir um fiskiskap við føroyskum skipum uttan fyri føroyskan sjógv. Eftir § 23, stk. 2 ásetir landsstýrismaðurin nærri reglur um býti av tøkum fiskimøguleikum, ið ikki eru bodnir út á uppboði, og hvussu fiskiskapurin skal fara fram.

Talan er um breiðar heimildir, sum lata upp til landsstýrismannin at gera av, hvussu fiskiskapur verður skipaður á øllum økjum, uttan har tað eru beinleiðis fyriskipanir í sjálvari lógini.

Lagt kann vera afturat, at heimildirnar í galdandi lóg eru orðaðar eins og í løgtingslógini um fyrisiting av sjófeingi (§ 28 og § 34), og eru í innihaldi tær somu, sum frá 1998 vóru í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

Til nr. 2-5.
Í løtuni fái eg ikki svarað spurningunum ítøkiliga og á fullgóðan hátt. Orsøkin er, at málið ikki er liðugt viðgjørt í Fiskimálaráðnum, og at tað tí heldur ikki er endaliga gjørt av, hvussu verður við teimum 10.000 tonsunum av makreli, herundir hvør leisturin verður, ella um hvørjar nøgdir fara at verða útlutaðar. Tey fyrisitingarligu fyrilitini og viðurskifti annars, ið spyrjarin er inni á, eru sjálvsagdir tættir í viðgerðini og viðkomandi, tá fyrisitingin tekur avgerðir í málinum.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður